Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Johan Dahl, løgtingsmaður

Svarari: Margit Stórá, landsstýriskvinna í heilsumálum

Evni: Afturrindan av heilsutrygdargjaldi til útisiglarar

Spurningar:

1. Hvat er status við arbeiðinum at broyta lógina um heilsutrygd í sambandi við afturrindan av heilsutrygdargjaldi til útisiglarar?
2. Nær kann væntast meira nágreiniliga, at lógaruppskot verður lagt fyri tingið?
3. Hví hevur tað tikið so langa tíð at koma í tingið við hesum málinum ella einum lógaruppskoti?
4. Hvat er endaliga metta endurgjaldið til teir/tey, sum hava goldið heilsutrygdargjaldið av órøttum?

Viðmerkingar:
Útisiglarar fingu viðhald í bæði kærunevnd, Føroya Rætti og Landsrættinum, og tá ið Heilsutrygd ætlaði í Hægsta Rætt við málinum, fekst ikki loyvi til at royna tað har.

Margit Stórá, landsstýriskvinna í heilsumálum, skuldi tí gera eitt lógaruppskot, so teir útisiglarar, ið hava goldið heilsutrygdargjald av órøttum, kunnu fáa pengarnar aftur.

Mett verður, at neyðugt er at gera eina lógarbroyting, soleiðis at heimild fæst til at rinda heilsutrygdargjald afturvirkandi til persónar, sum av órøttum hava goldið ov nógv í heilsutrygdargjaldi.

Síðan kom fram alment, at lógaruppskotið um broyting í heilsutrygdarlógini verður klárt til at leggja fyri Løgtingið fyrst í nú nýggju tingsetuni, men enn er onki at frætta í málinum, og tað kann ikki góðtakast, at málið blívur við at draga út. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 2. august 2024

Johan Dahl